## Tingast aftur í morgin

Í morgin fara formaðurin í grønlendska landsstýrinum, Kuupik Kleist, og danski veðurlágsmálaráðharrin, Connie Hedegaard, at tosa um, hvørja støðu Grønland skal taka til eina komandi veðurlagsavtalu. Tey bæði hittust í síðstu viku og skuldu hittast aftur nú, men fundarvirksemið í Landstinginum ger, at Kuupik Kleist hevur ikki stundir at fara til Danmarkar, sigur grønlendska kringvarpið. Tí skulu tey tosa í telefon í morgin. Grønland vil hava somu møguleikar sum menningarlondini, soleiðis at landið kann menna ídnaðin hóast skerdar $CO_2$-kvotur.



## Upsi úr Alaska fyri tosk

Í mong ár hevur toskur verið tað fiskaslagið, sum Evropasamveldið innflytur mest av, men soleiðis er ikki longur, tí í fjør var tað tann sokallaði Alaska-upsin, sum stóð ovast á innflutningslistanum. Frágreiðingin er sambært ES-myndugleikum, at tað var ikki so nógvur toskur á marknaðinum, tí fleiri lond skerdu sínar kvotur, og harafturat fór prísurin upp. Toskafiskiskapurin í fjør minkaði 10 prosent úr 945.000 í 849.000 tons, samstundis sum innflutningurin av Alaskaupsa vaks 3,5 prosent úr 875.000 tonsum í 906.000 tons.

# Riggar ikki við børnum og ungum á sama stovni



**- Vit fara allastaðni við børnunum, og ikki fyrr enn vit halda, at tey umsíðir kunnu ferðast einsamøll, eitt nú í bussi, lata vit tey fara uttan fylgjara. Tað hevði tí verið ógvuliga óhøgligt alla tíðina at farið oman úr Mjørkadali og niðanaftur, tá vit skuldu út við børnunum, eitt nú til svimjing og aðrar aktivitetir í Havn, siga starvsfólk, sum hava sagt seg úr starvi á Rókini, tí tey eru ímóti samanlegging, eins og tey eru ímóti at børn og ungdómar eru á sama stovni**

STOVNAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú landsstýrið hevur gjørt av, at børn og ungu, sum hava verið brúkarar á teimum báðum stovnunum, Rókini og Slóðini, skulu flytast niðan í Mjørkadal, halda fyrrverandi starvsfólk, sum áður arbeiddu á Rókini, at Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna, ikki sigur allan sannleikan.

Í sínum svari til Høgna Hoydal á tingfundi í gjár, tá løgtingsmaðurin spurdi landsstýriskvinnuna í almannamálum um framtíðarlagnuna við Rókini og Slóðini, segði Rósa Samuelsen, at báðir stovnarnir skulu leggjast saman, og at teir skulu halda til í Mjørkadali.

Hon legði aftrat, at flutt verður í Mjørkadal til várs.

### Politikarar øtaðust

Í svari sínum til fyrispurningin, segði landsstýriskvinnan eisini, at eitt nú starvsfólkið og barnaverndartænastan hava verið við í tilgongdini - at leggja stovnarnar saman.

Fleiri politikarar øtaðust á tingfundinum í gjár um ætlaninar hjá landsstýriskvinnuni, og eitt nú Jenis av Rana rópti ætlanina sinnissvaka - at flyta hesi børn og ung langt av alfaraveg og niðan í hagan, sum hann tók til.

Úttalilsini hjá Rósu Samuelsen førdu eisini til, at bæði feløg, barnaverndartænasta og fyrrverandi starvsfólk á Rókini gjørdu vart við seg.

### Flestu eru farin

Fyrrverandi starvsfólk á Rókini vendu sær soleiðis eisini til Sosialin og Rás2 í gjár.

Tey halda ikki, at Rósa Samuelsen sigur allan sannleikan, tá hon í sínum svari vísir á, at starvsfólk og barnaverndartænastan høvdu verið við í tilgongdini, sum hon orðaði seg.

- Av átta starvsfólkum, sum arbeiddu á Rókini, eru vit seks farin úr starvi, tí okkum líkar ikki ætlaninar um samanleggin við Slóðina og tí, vit ikki vilja niðan í Mjørkadal við hesum børnum og ungum.

Tey siga seg hava verið á nógvum fundum við eitt nú stjóran á Almannastovuni.

- Vit halda, at ætlaða

*- Tey eldru eru fysiskt væl fyri; tey kunnu drekka, berjast, eru seksuelt aktiv, og onkur brúkar kanska eisini onnur rúsandi evni. Tí eru hesi slett ikki egnaði at búgva saman við 10-14 ára gomlum børnum, siga fyrrverandi starvsfólk á Rókini*



*Tilvildarlig mynd*